

## Mona setti nýtt met

Allir føroysku svimjararnir, sum luttaka í HM í Melbourne í hesum døgum, vóru í hylinum í nátt. Fyrst vóru tað Mona Simonsen og Jutta Thomsen, sum tóku lut í 800 m frí, og her gjørdi Mona ikki mætari enn at seta nýtt føroyskt met við tíðini 9.18,65. Hon tók heili 15 sekund av gamla metinum hjá Juttu Thomsen. Tær báðar endaðu á ávikavist 35. og 42. plássi av 49. Seinni svumu Kristian Olsen og Pál Joensen 50 m frí. Teir endaðu á ávikavist 77. og 115. plássi av 178.

## Todi ikki við ímóti AGF

Tað eru á leið tvær vikur síðani Todi og aðrir føroyingar keyptu Fremad Amager, og tá var ætlanin, at Todi skuldi vera partur av liðnum. Hann verður tó ikki við í fyrsta dystinum eftir vetrarsteðgin, tá Fremad Amager møtir AGF. – Har er nokk at gera uttanfyri vøllin hjá mær júst nú, so eg verið ikki við enn, sigur Todi við heimasíðuni hjá felagnum. Hann leggur tó afturat, at øll gleða seg til fyrsta dystin ímóti AGF um vikuskiftið.

# Vágaskot fekk sín fyrsta føroymeistara

**BOGASKJÓTING**

*Tíðindaskriv*



Leygardagin 24. mars skipaði Bogaskjótifelagið Tambar í Havn fyri seinastu innandura FM-kappingini í vetur, tá børnini skutu 15 metur. Aftur hesaferð vóru fleiri persónlig met og Bogaskjótifelagið Vágaskot fekk sín fyrsta føroyameistara.

Bogi Andreasen føroyameistari

Í bólkinum recurve vóru 11 luttakarar og innleiðandi úrslitini vóru: nr. 1 Sjúrður Rein, T (276+281) 556 stig, nr. 2 Nikkel Petersen, Ø (270+272) 542 stig, nr. 3 Andras á Lofti, V (266+272) 538 stig og nr. 4 Rógvi Dalsgarð, T (246+247) 493 stig.

1/8-finalurnar: Bogi Mørkøre, Ø, og Tummas Eidesgaard, Ø, 95-89, Sirið Rein, T, og Rani Joensen, T, 97-83 og Rógvi Larsen, T, og Heðin Olsen, T, 96-88. Hinir skjúttarnir sótu yvir.

¼-finalurnar: Bogi Andreasen, V, og Rógvi Dalsgarð, T, 111-95, Andras á Lofti, V, og Rógvi Larsen, T, 100-100 og mátti ein eyka pílur gera av, hvør vinnarin skuldi verða. Andras vann 9-8. Sjúrður Rein, T, og Bogi Mørkøre, Ø, 113-86, Nikkel Petersen, Ø, og Sirið Rein, T, 108-98.

½-finalurnar: Báðar hálvfinalurnar gjørdust sera spennandi, tí tær endaðu báðar javnar og var neyðugt við eyka píli fyri at finna vinnararnar. Sjúrður og Bogi skutu 104-104. Bogi vann umskjótingina 10-9. Nikkel og Andras skutu 110-110 og vann Andras umskjótingina 9-8.

Bronsufinalan var sostatt millum Sjúrða og Nikkel, her vann Sjúrður trykt 114-100.

Gullfinalan var heldur óvanlig, tí hesaferð vóru tað tveir vágadreingir, sum skuldu dystast. Tað var Bogi Andreasen, sum dróg longra stráið og vann dystin 104-100 og vann sítt fyrsta føroyameistaraheitið, og bleiv samstundis eisini fyrsti føroyameistarin í Bogaskjótidelagnum Vágaskoti.

**Kaj Johannesen vann FM**

Í bólkinum compound vóru 4 luttakarar og vóru innleiðandi úrslitini hesi: nr. 1 Magnus Andreassen (287+281) 568 stig, nr. 2 Kaj Johannesen (278+282) 560 stig, nr. 3 helgi Lamhauge (278+281) 559 stig og nr. 4 Kristoffer Andreasen (277+279) 556 stig. Allir úr Ørvi.

½-finalurnar: Magnus Andreasen og Kristoffer 115-113, Kaj og Helgi 111-109.

Bronsufinalan var millum Kristoffer og Helga og var sera jøvn. Teir skiftust um at vera eitt stig framman fyri hvønn annan 28-28, 29-28, 26-28 og 29-27. Dysturin endaði við sigri til Kristoffer 112-111.

Gullfinalan millum Magnus og Kaj var eisini sera jøvn, sum tað sást á umfars úrslitunum 28-27, 28-28, 27-28 og 28-28 – samlað 111-111, og var eisini her neyðugt við eyka píli. Kaj vann 10-9 og vann sostatt føroyameistaraheitið.

**Ársins skjúttar**

Eins og undanfarin ár valdi Bogaskjótideildin ársins skjúttar millum tey yngru. Tað vóru tveir teir somu skjúttarnir, sum vunnu aftur í ár. Teir vóru Sjúrður Rein, Tambar, í recurve, og Magnus Andreassen, Ørvur, í compound.

Hesir báðir hava staðið seg sera væl í kappingunum í vetur, teir hava skotið fleiri persónlig og føroysk met og hava so at siga vunnið allar kappingarnar hjá teimum yngru. Eisini hava teir víst dirvi við luttøku í kappingunum hjá teimum vaksnu við góðum úrslitum.

Bogaskjótideildin takkar Statoilstøðini, Saltangará, fyri stuðulin til heiðursmerkir og steyp.

*Schandorff Vang*
*Bogaskjótideildin*

# Sentrali miðvøllurin hevur verið burtur

**Fyrireikingarnar hjá Kurt Mørkøre og hansara monnum hava verið órógvaðar undan vitjanini av KÍ, sum frá í fjør hevur góð hagtøl at minnast aftur á móti B36 í Gundadali**

**B36-KÍ**

*Jákup Mørk*

B36 hevur bara fokus á landskappingini og meistaraheitinum. Møguleikin at endurvinna løgmanssteypið hvarv í fyrstu royndini, sum var ímóti AB í Gundadali. Tað var stórt vónbrot, og tað verður ógvuliga herkin bitið hjá teimum í árstalsfelagnum, um tað ikki á heimavølli eydnast at fáa øll stigini ímóti KÍ. Síðani steypadystin hevur B36 fingið størri tyngd í álopið, nú Sylla er komin aftur til landið.

Uppgerðin er merkisverd, tí Kurt Mørkøre, sum hevur ógvuliga stóra fótbóltstign í Klaksvík og barndómsfelagnum, nú er venjari hjá B36. Saman við honum eru fleiri, ið hava havt nógv við KÍ at gera. Hjálparvenjarin, D. J. Joensen, var hjálparvenjari hjá Tony Paris og KÍ í fjør, og millum B36 spælararnir eru Jákup Mikkelsen, Ovi Nysted og Allan Mørkøre, sum allir eru uppaldir í KÍ.

B36 fyrireikingarnar hava seinastu tíggju dagarnar verið merktar av, at sentralu miðvallararnir ikki hava luttikið í venjingunum. Talan er um Mikkjal Thomassen og Fróða Benjaminsen, sum hava verið upptiknir av landsliðnum. Teir komu aftur til landið seint í gjárkvøldið.

Í Klaksvík bíða teir framvegis eftir rættuliga at sleppa at royna seg. Steypadysturin í Gøtu er útsettur til flaggdagin.

Burtursæð frá málverjanum, Meinhardi Joensen, sum hevur verið í Georgia, hava allir hinir vant saman. Undantakið er Kareem Smith, útlendski verjuspælarin, sum í einar tríggjar vikur hevur verið darvaður av lærskaða.

KÍ var tvær ferðir í Gundadali og spældi ímóti B36 í fjør, og hagtølini frá teimum báðum uppgerðunum eiga at geva klaksvíkingunum í KÍ gott mót. Fyrru ferðina var úrslitið 1-1, og í seinna førinum smurdi KÍ B36 av 5-1.